Fylgiskriv 2

## Hoyringarsvar frá TAKS

TAKS hevur nakrar viðmerkingar til lógaruppskotið um broytingar til skattalógina um frádrátt til lærlingar.

Til § 1:
Sambært ásetingini skal talan vera um "galdandi" lærusáttmálar. Tað framgongur ikki av orðaljóðinum at talan skal vera um lærusáttmálar, góðkendar av føroyskum myndugleikum. Sum orðingin er í uppskotinum, so verður talan um allar "galdandi" lærusáttmálar, eisini útlendskar. Vit fara tí at gera vart við, at vit ikki meta okkum før fyri at meta um, hvørjir føroyskir ella útlendskir lærusáttmálar, eru galdandi og vit fara tí at mæla til, at FMR umhugsar at seta eina orðing í ásetingina "…. Galdandi lærusáttmála, sum er góðkendur av føroyskum myndugleika."

Sum vit lesa uppskotið, er talan um ein generellan frádrátt í samlaðu ársinntøkuni hjá lærlingum, tvs. at frádrátturin er ikki avmarkaður til einans at vera í lærlingainntøkuni, men í allari inntøku. Uppskotið tekur ikki hædd fyri, um talan er um ein lærling umbroð á einum FAS skipi, har skatturin, t.e. 35% av FAS inntøkum hjá lærlinginum, verður borðin aftur til reiðarríið ella um ein lærlingur fær fyritíðarpensjón og ikki lærlingaløn.

Tað er nevnt í uppskotinum, at tað krevur arbeiðsorku. Eitt er, at 1000 umsóknir skulu viðgerðast manuelt - helst fyrst í árinum, og harafturat koma rættingar og broytingar, so sum niðurrokning av døgum, broytingar í læruplássi osfr., sum eisini krevja arbeiðsorku at umsita.

Skipanirnar hjá TAKS skulu tí mennast, bæði skattaskipanin, so frádrátturin kann skrásetast rætt, eins og Borgaragluggin skal mennast, soleiðis at skattgjaldarin kann skráseta frádráttin á sjálvuppgávuni, saman við neyðugum skjølum.

Kostnaðurin fyri at menna skipaninar er mettur til kr. 200.000. Henda upphædd skal tó takast við fyrivarni.

Vinarliga

**Birta Biskopstø**
deildarleiðari

Lógardeildin

TAKS

Postrúm 2151, 110 Tórshavn

www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

**Fyrivarni**

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.